# Fjarur ella veruleikafjarur Poulsen

ROLF GUTTESEN
11. juni 2007



Eg skal ikki gita um, hvar Leo Poulsen býr, ella hvat hann annars hevur tikist við her í lívinum. Tað hevur einki við sakina at gera. Og sakin er, at Poulsen hevur refererað eitt ummæli í Børsen av bókini hjá Astrup um bankasøguna í Føroyum.

Tað er skrivað av Hugo Gården, sum arbeiðir fyri "Børsen" í kinesiska býnum Shanghai. Mín kritikkur var, at hetta referat hjá Poulsen - enda í annan - var misskilt, tendentiøst og bert hevði sum endamál at styðja upp undir mytur um, at "Nyrup og danir høvdu skyldina."

**Poulsen ikki førur fyri at svara**

Tíverri er tað so, at Poulsen ikki er førur fyri at vísa einum einasta kritikkpunkti hjá mær aftur, men vevur um alt møgulig annað, sum ongan relevans hevur. Eg skal ikki taka alt hansara svass uppaftur, tað duga lesararnir saktans á at skyna sjálvir. Eg loyvi mær bara at kalla tað vánaligt journalist-arbeiði.

Eg vísti á, at í greinayvirskriftini hjá Poulsen vóru ikki minni enn tríggir faktuellir feilir, sum ongan stuðul høvdu, hvørki í greinini hjá Gården ella í bókini hjá Astrup. Haraftrat vísti eg á, at Poulsen ikki so frægt sum dugir at skriva av. Endurgevur eitt citat skeivt, við skeivari meining. Aftur vánaligt journalist-arbeiði.

Poulsen heldur, at tað diskvalificerar meg, at eg ikki havi adressu í Føroyum, men búgvi í Brøndbyøster. Men hví er Hugo Gården, sum býr tíggju ferðir longri burturi, í Shanghai, og sum kanska ongantíð hevur verið í Føroyum, eitt serligt sannleiksvitni?

**Hvar hevur Poulsen verið?**

Hvussu ber tað til, at føroyska bókin hjá Astrup og Jóan Paula, sum kom út fyri hálvum ári síðani, yvirhøvur ikki hevur fingið nakra umtalu í blaðnum? Hvar var Poulsen tá?

Hvussu ber tað til, at bókin hjá Astrup á donskum, sum kom í mai mánaði, heldur ikki hevur fingið nakra umtalu? Hvar var Poulsen tá?

Hvussu ber tað til, at eitt stutt og ikki serliga beinrakið ummæli í útlendskum blað, fær Poulsen at vakna? Hví er tað nú knappliga "big news" í Føroyum, at eitt danskt blað skrivar um eina bók.? Hví skrivar Poulsen so eitt vánaligt referat, fylt við feilum og tendentiøsum útleggingum?

Kanska tað einasta, sum kvalificerar mangulfulla ummæli í Børsen at koma fram í Sosialinum, er, at tað serliga umtalar politikarar og Nyrup! Tí hetta kann brúkast til at dyrka mytuna um, at tað vóru "hinir", sum høvdu skuldina.. "Góða mamma tað var ikki eg, dreingirnir teir fýrdu meg."

**Poulsen diskvalificerar sín egna blaðstjóra**

At enda má eg siga, at tað undrar meg stórliga, hvussu Poulsen óbeinleiðis leggur á sín egna blaðstjóra. Poulsen háar mína skriving, sum mest hevur verið í Sosialinum. Eitt nú skrivaði eg í 2005 - eftir avtalu við blaðstjóran - eina grein um vikuna til "vinnusíðurnar."

Eg hoyrdi einki um, at tær vóru "veruleikafjarar," ella at eg var "klókur upp á hvat sum helst." Men Poulsen sigur nú óbeinleiðis, at blaðstjórin ikki dugdi at meta um kvalitetin á tí vøru, hann sjálvur hevði bestilt. Álvarslig skuldseting?

**Dugir Poulsen at svara?**

Av tí at Poulsen ikki hevur svarað upp á nakað sum helst, so spyrji eg einaferð aftrat:

- Meinar tú, at "Nyrup (hevði) skuldina av bankakreppuni?"
- Meinar tú, at henda skuldseting kann lesast úr ummælinum hjá Hugo Gården?
- Meinar tú, at henda skuldseting kann finnast í bókini hjá Astrup?

# Ótrúligt atgerðaloysi

HERGEIR NIELSEN



Í oktober mánaði í fjør skutu vit upp at javnseta flutningskostnaðin um firðir og sund við kostnaðin gjøgnum undirsjóvartunlarnar.

Ein samanbering vísti, at ferjuflutningurin var upp í fimmogtjúgu ferðir so dýrur, sum samsvarandi flutningur gjøgnum undirsjóartunlarnar var.

Um ársskiftið royndu vit yvir fíggjarlógina at avtaka og í øðrum lagi at lækka henda kostnað munandi, men tað var sum at vísa hundi brand.

Vit hildu ójavnan upp í fimm og tjúgu ferðir vera órímiligan og oyðileggjandi fyri kappingarførið úti um landið, meðan landsstýrismaðurin helt væl til standa.

Vit royndu í sjálvstøðugum uppskotum, og vit royndu yvir fíggjarlógina, men alt varð kveistrað til viks sum grenj og møsn.

Meðan landsstýrismaðurin onga roynd gjørdi og einki stig tók til at lækka kostnaðin, so eyðnaðist kortini at fáa meiriluta á tingi fyri hesum átaki.

Hetta var um ársskiftið 2006/2007.

Nú vit fara um longsta dag í 2007 sigur landsstýrismaðurin við útvarpið, at hann fær einki gjørt við tær 5 mió.kr., sum løgtingið bar honum upp í hendurnar um ársskiftið, og at hann framvegis **bíðar eftir politiskum signalum.**

Landsstýrismaðurin er komin eftir, at um hann lækkar prísirnar í ár, noyðist hann at hækka teir aftur, tá fíggjarárið rennur út. (Útvarpið 8. juni 2007)

Atgerðaloysi kostar her og har, og skilligt er, at landsstýrismaðurin er gyrdur í brókum, nú hann sær seg noyddan at hækka flutningsgjøldini aftur 14 dagar undan vali.

Ongantíð kom hann sjálvur við nøkrum uppskoti um økt túratal, og heldur ikki kom hann við nøkrum uppskoti um lægri flutningskostnað.

Sami maður, sum lá í signalloysi, tá hann hækkaði tunnilsgjøldini við 25%, og hækkaði koyggjugjøldini við 300%, sigur seg nú bíða eftir signalum frá einum løgtingi, sum er farið í summarfrí.

Skil tað, hvør ið kann.

Ferðamannalandið Føroyar 2007, sum landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av, hevur fyri rúmari tíð síðan skipað seg í føstum sambandi og í lýstum ætlanum um firðir og sund.

Suðuroyggin er kortini ikki við í hesi ætlan.

Vit fingu ein stásiligan Smyril fyri 1½ ári síðan við veldugum møguleikum, men framvegis sakna vit tann rætta politiska viljan og tað rætta handalagið, so at nakað skilagott fæst burturúr íløguni.

Ferðaætlanin, sum skuldi koma árið fyri, nærkast nú árinum eftir, og játtanin til lægri prísir er blivin so heit, at hon framvegis liggur óbrúkt.

Og tað er ikki bara á hesum øki, at atgerðaloysið rópar til himmals.

Hóast greiðar - og enntá skrivligar avtalur millum landsstýrismannin og allar kommunurnar í Suðuroynni - hevur sami landsstýrismaður kveistrað hesar somu avtalur til síðis og hevur lagt sjálva vakstraravtaluna fyri Suðuroynna á ís.

Sami landsstýrismaður, sum í meira enn eitt ár hevur sagt seg hava loyst øll mál á útlendingaøkinum "um ein mánað," heldur framvegis fast um henda eina mánaðin sum freist, meðan loysnirnar nærkast árum. (Útvarpið 1. juni 2007)

Í Hvalba situr ein fremmand einsamøll mamma við barni sínum á áttanda ári og bíðar eftir eini loysn, og Gud hjálpi tú okkum, sigur landsstýrismaðurin nú, at spurningurin um hesi neyðars fremmandu menniskju, sum í áravís hava fingið lyfti um at fáa svar "um ein mánað," nú aftur skulu brúkast í valstríðnum komandi.

Øll minnast vit valstríðið farna hjá hesum somu monnum:

"Vit fara ikki at blaka Føroyar víðopnar fyri øllum tí drasli, sum rekist runt." - "Fólkaflokkurin fer at stríðast alt tað, vit orka, fyri at halda slíkar hordir av fólki úti." (Í andgletti 12. januar 2004.)

Yuppie - facisman hevði ikki farran av gestablíðni í sær, men hon bergtók Javnaðarflokkin so mikið, at hann treytaleyst gav Fólkaflokkinum útlendingamálini - at liggja omaná.

Tjóðveldisflokkurin er sjálvandi gingin ímóti hesum rákinum hjá samgonguni, og sjávandi hava vit víst á skilagóðar loysnir.

Ferð eftir ferð hava vit roynt eftir undirtøku fyri at taka málsøkið undir føroyska umsiting, so at vit fáa virðiligar og skilagóðar loysnir, men eisini her møta vit mótstøðu frá heimastýrisflokkunum.

Tað er bara heilt ótrúligt, at teir sum umsita málsøkið nú á áttanda ári, rópa út í almenningin, at tað er..." væl hugsandi, at viðurskiftini hjá útlendingum í Føroyum verða ein partur í valstríðnum til næsta løgtingsval."(Útvarpið 8. juni 2007.)

Hví ikki loysa trupulleikarnar, meðan valdið og amboðini eru í hondunum?

Ferðaætlanin, kostnaðarlegan, kappingarførið, vakstraravtalan, lívfrøðiliga margfeldi, Kyotosáttmálin og útlendingamálini, eru bara fá av mongum málum, sum liggja í atgerðaloysi á hægstu summartíð - tíverri.

# Eru føroyskir fjølmiðlar álítandi....

**- ella er neyðugt við manipulatión og ósannindum fyri at selja sínar vørur ella fyri fáa tíðindini áhugaverd.**

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður og fyrrv. landsstýrismaður í útlendingamálum



Mikudagin 6. juni hevði Beate L. Samuelsen, blaðkvinna Dimmalættingar, drúgva og í høvuðsheitum áhugaverda samrøðu við Gianfranco Contri, sum ídag millum føroyingar helst er betri kendur fyri sítt arbeiðs- og uppihaldsloyvi enn fyri orðabókaarbeiðið hann útinti, meðan hann var í Føroyum.

**Søkti og fekk loyvi**

Lat meg gera vart við, sum fleiri ferðir fyrr, eftir aftur at hava kannað málið í Innlendismálaráðnum, so hevur italski orðabókamaðurin Gianfranco Contri bert einaferð søkt um at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Hetta var í 2004, hetta loyvið fekk hann. Hetta er einasta skráseting sum finst í Innlendismálaráðnum.

Fyrstu ferð eg hoyrdi, at italiumaðurin Gianfranco Contri fekk "tikið ímóti M. A. Jacobsen virðislønini, áðrenn myndugleikarnir sendu hann av landinum", var á Johnsigurd Johannesen sjónvarpsmaður í Sjónvarpi Føroya elegant, sum hetta fjølmiðlanátúrtalent dugir, í endanum av eini tíðindasending legði dent á hetta.

Gianfranco Contri hevur bert einaferð søkt um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, hetta var í 2004. Hetta loyvið fekk hann. Í Innlendismálaráðnum finst eingin onnur skráseting. Eg gjørdi Johnsigurd Johannesen varðugan við, at hann bar skeiv tíðini, uttan at hesin nakrantíð kom við nakrari rætting. Hann bara smíltist niðurvið, sum hann ofta ger, tá okkurt tílíkt er áfatt. Nú geri eg so Beate L. Samuelsen hetta eisini greitt.

**Ongin rættleiðing**

Beate L. Samuelsen sigur í greinini ikki bara einaferð, men hon endurtekur seg sjálva, at Gianfranco Contri, "búði í Føroyum í nógv ár, til myndugleikarnir sendu hann heim..." ella "Tað eydnaðist honum at gera orðabókina lidna, beint áðrenn seinastu boðini frá myndugleikunum komu um at fara heimaftur til Italia".

Eg rokni ikki við at hesi koma við nakrari rættleiðing til skeiv og manipulerandi tíðindi, men hava tey aðra grundgeving og tí kunnu rætta meg, eru tey vælkomin.

Lat meg eisini her siga, at sjálvandi skal ein politikari tola, men hetta er eisini skeivt at gera ímóti avgreiðslustarvsfólki í Innlendismálaráðnum.

**Tíðindaleiðari Útvarpsins tagnaði herfyri**

Fyri stuttum var eg í avmarkaðum blaðkjaki við tíðindaleiðaran Johann Mortensen á Útvarpi Føroya,um okkara "Public Service" stovn. Tíðindaleiðarin bað meg bara arogant senda kæru inn til fjølmiðlanevndina um skeiv tíðindi!

Eg havi ongantíð sent kæru inn – og ætli heldur ikki at gera tað, tí hóast tú fært rætt, hevur tað, sum tíðin líður frá, onga tyngd.

Eg vísti til tvinnar manipulerandi tíðindastubbar, har annar var heldur óndsinnaður. Sjálvandi fættist einki aftur. Hann bráðtagnaði eftir fyrsta álopið. Eg havi ein varhuga hví!

Men nakrar dagar seinni kom so eitt hálvófantaligt svar frá hansara stuttliga samstarvsfelaga og møguliga samspælara, Hilmari Jan Hansen, á forvrøvlaða kjaktorginum á Norðlýsinum, sum ikki eigur at vera tikið fyri meira, enn tað er.

Ja, synd er at siga, at støðið liggur høgt hjá okkara objektiva skattaborgaragoldnað public service stovni.

Tí er tað ikki bara eg sum spyrji, men fjøld av Føroya fólki: "Eru føroyskir fjølmiðlar álítandi, ella er neyðugt við manipulatión og ósannindum, fyri at selja sínar vørur ella fyri fáa tíðindini áhugaverd".

keldu@post.olivant.fo